## Nógv skaðadjór



Tey seinastu árini hava danir kært seg nógv um tann sokallaða dreparasnigilin, sum oyðileggur grøðina í urtagørðunum, men hann er í veruleikanum bara ein av mongum plágum, sum danir hava fingið og fara at fáa at stríðast við. Ein asiatiskur snigil er tætt sunnan fyri markið við Týskland, og vaskibjørnin nærkast eisini. Í sjónum hava menn funnið eitt djór, sum etur alt livandi, sum tað kemur framá, og sum kann hótta fisk og djór í sjónum.

## Beinir til Sørvágs

Sørvingar hava saman við øðrum keypt trolaran Beinir frá partafelagnum Kimbli í Havn

Lemmatrolarin Beinir skal nú skrásetast í Sørvági. Eitt nýtt partafelag, sum hevur heimstað í Sørvági, hevur keypt trolaran frá partafelagnum Kimbli í Havn.

Tað eru teir,sum frammanundan eiga trolaran Vesturskin, ið eru høvuðseigarar í nýggja felagnum, sum teir hava stovnað við øðrum sørvingum.

Prísurin fyri Beinir er millum 19 og 20 mió. krónur, sigur Útvarpið.

Jørgen Niclasen:

# Rúna Sivertsen er avgjørt ein missur fyri Fólkaflokkin



**Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum, harmast avgerðina hjá Rúnu Sivertsen um at taka seg seg úr flokkinum. Hon er avgjørt ein missur fyri flokkin, heldur formaðurin**

POLITIKKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Rúna Sivertsen var heilt vist eitt aktiv fyri Fólkaflokkin, heldur nýggi formaðurin í flokkinum, Jørgen Niclasen. Tí harmast hann eisini um, at Rúna hevur boðað frá, at hon tekur seg úr flokkinum.

### Nógvar dygdir

Í blaðnum í gjár greiddi Rúna Sivertsen frá, at tað var orsakað av vantandi møguleika at gera sína ávirkan galdandi, at hon tók seg úr Fólkaflokkinum. Hetta harmar nýggja formannin ikki minst júst nú, ið hann hevur sett sær fyri at breiðka flokkin. Sum formaður í Fólkaflokkinum er tað millum annað uppgávan hjá Jørgen Niclasen at endurnýggja flokkin. Eitt av hansara aðalmálum í tí sambandi er nettup, at yngru og kvinnuligu kreftirnar fáa meir pláss og verða sjónligari.

– Hetta er jú nettup nakað av tí, Rúna Sivertsen hevur eftirlýst og hevði tað verið ein upplagdur møguleiki hjá henni at gjørt seg meir galdandi, sigur Jørgen Niclasen, sum heldur, at Rúna Sivertsen hevur nakrar dygdir, sum flokkurin hevur havt gleði av.

– Rúna Sivertsen dugir serliga væl at bera fram sín boðskap á ein hátt, sum treingir væl ígjøgnum. Hartil er hon sera arbeiðssom, sigur formaðurin.

### Vælkomin aftur

Hesar dygdir fær flokkurin neyvan gleðir av framyvir. Jørgen Niclasen frætti um avgerðina hjá Rúnu Sivertsen í fjølmiðlunum og hevði sostatt ikki møguleika at biða hana umhugsa sína støðu enn einaferð.

– Tað hevði eg heilt vist havt gjørt, um eg hevði møguleikan. Hinvegin hevði tað neyvan broytt nakað, tí sum hon sjálv sigur, hevur hon umhugsað sína støðu í flokkinum leingi, sigur Jørgen Niclasen, og leggur afturat, at hon er vælkomin aftur, um tað skuldi verðið.

– Hurðarnar hjá Fólkaflokkinum standa framvegis opnar fyri Rúnu Sivertsen, sigur hann.

Hóast Jørgen Niclasen harmast um avgerðina hjá Rúnu Sivertsen, so leggur hann áherðslu á, at tað framvegis eru nógvar góðar kreftir í flokkinum. Eisini kvinnur, sum vit koma at síggja munandi meir til, tá vit nærkast løgtingsvalinum.

– Men tað er altíð ein missur, tá góðir stuðlar venda flokkinum bakið. Tað ræður jú um at fjølga um flokkin og ikki øvugt, sigur Jørgen Niclasen.

Fyrilestrarøð:

# Frá gudum til robottar

**Komandi mánað byrjar listasøguliga fyrilestrarøðin "Frá gudum til robottar – fra marmormyndum til elektriska list" við listfrøðinginum, Mette Wivel**

MENTAN
*Anna V. Elingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fyrilestrarøðin gevur grundleggjandi fatan av evropeiskari myndlistasøgu. Í fyrilestrunum fer Mette Wivel at viðgera málningalist, skulptur og byggilist við menn¬ingini hjá einstaka listafólkinum í huga. Hvørt tíðarskeið verður lýst við støði í list og listafólki, sum á serligan hátt hava verið við til at skapa nýggja hevd og nýggj listalig rák. Fyrilestrahaldarin fer at seta -ismur og tíðarskeið í ein samfelagsligan samanhang. Harumframt spyr hon: Hví sær listin soleiðis og/ella soleiðis út í hesum og hasum tíðarskeiðinum? Somuleiðis fer hon at seta fokus á einstaklingar, sum hava havt ein avgerandi søguligan leiklut fyri menningina av samfelagnum. Hartil verða faklig heiti, tøkni, ikonografi (læran um symbol) og myndamál sum heild greidd og greinað.

### Fyrilestrarøðin er skipað soleiðis:

1.: 15.-16. september 2007:
frá fornøld til renæssansu, 700 f.Kr.- 1400 e.Kr.

2.: 16.-17. februar 2008:
frá renessansu til barokk, 1400-1700

3.: 17.-18. mai 2008:
rokoko, upplýsingartíð til impressionismu, 1700-1850

4.: 13.-14. september 2008:
frá impressionismu til abstraka ekspressionismu, 1850-1950

5.: 15.-16. november 2008:
frá abstraktari ekspressionismu til videolist.



Allar dagarnar kl. 10-15.30 við kaffi/testeðgum og einum tíma døguðrasteðgi.

Ætlanin er, at skeiðið skal vera á Fróðskaparsetrinum – nágreiniligari boð verða givin seinni.

Fyrilestrarøðin er almen, men tað er neyðugt at tekna seg.

Meir fæst at vita um kostnað, tekning o. a á heimasíðuni hjá Listasambandi Føroya, www.lisa.fo á slóðini Skeið í listasøgu

Tað eru Listafelag Føroya, Føroysk Myndlistafólk og Fróðskaparfelagið, sum skipa fyri fyrilestrarøðini

# Námsfrøði nú og í framtíðini

**Pedagogfelagið skipar fyri námsfrøðiligari ráðstevnu 13. og 14. september**

NÁMSFRØÐI
*Tíðindaskriv*

Í sambandi við at Føroya Pedagogfelag gjørdist 25 ár 1.juni í ár, verður skipað fyri eini ráðstevnu á Hotel Føroyum fyri limum felagsins 13. og 14. september.

Høvuðsevnið á ráðstevnuni er "Námsfrøði nú og í framtíðini". Við hesum vilja vit vísa á arbeiðið, sum verður gjørt í dag og hugsjónina um, hvussu vit í framtíðini kunnu gerast betri, soleiðis at vit eisini vinna størri virðing fyri okkara fakliga virksemi.

Vit leggja dent á at lýsa námsfrøðiliga arbeiðsøkið frá fleiri ymiskum sjónarhornum, soleiðis at evnini á ráðstevnuni fevna um so nógvar av limum okkara sum gjørligt. Hugsanin við ráðstevnuni er eisini at varpa ljós á námsfrøðiliga fakbólkin í føroyska samfelagnum og soleiðis vísa á týdningin og dygdina í pedagogiskum arbeiði.

Skráin er tískil sera fjølbroytt og spennandi.

Katrin Petersen, fyrsta forkvinna fyri Føroya Pedagogfelag, setir stevnuna. Síðani vera royndir og áhugaverdir fyrilestrahaldarar sum John Andersen, cand.psych. og Henrik Helweg, stjóri í fyritøkuni Partnermanagement, á skránni. Royndir og dugnaligir føroyskir námsfrøðingar sum Guðrun Winthereig Rasmussen, Gunrid á Plógv og Hanna Rubeksen, fara at hugleiða um námsfrøðiliga dygd í mun til teirra dagliga arbeiði. Turid Olsen, heilsuróktarfrøðingur fer, saman við Súsonnu Holm, námsfrøðingi, at viðgera úrslitið av eini kanning Turid hevur gjørt um námsfrøði í Føroyum.

Seinra dagin er Salome A. Thorisdóttir, forkvinna fyri Íslendska pedagogfelagið fyrst á skránni. Eftir hetta fer Guðrun Eysturlíð, pedagogur, at tosa um menniskjasýnið og relatiónsarbeiðið. Fakligi parturin av ráðstevnuni endar við Dánial Hoydal, tekstahøvundi, sum fer at tosa um retorikk og námsfrøði.

Fólk frá Tjóðpalli Føroya enda síðani ráðstevnuna við eini stuttligari mentanarframførslu.

Tilmeldingarblað er at finna í blaðnum. - Luttøkugjaldið er kr.2.000 íroknað mat og kaffi

báðar dagarnar. Seinasta freist at tekna seg til ráðstevnuna er mánadagin 03. september.